## Bárður helst til B36

Tað er líkt til, at Bárður Olsen úr EB/Streymi fer at spæla við B36 eftir summarsteðgin. Álítandi keldur vilja vera við, at munnlig avtala er fingin í lag, og nú restar bara undirskriftin í. Ein trupulleiki tykist vera, at EB/Streymur ikki vilja leysgeva Olsen ókeypis, og spurningurin er, um B36 er sinnað at gjalda fyri miðvallaran. Málið verður helst avgreitt í vikuni.



## Landsliðið úttikið í vikuni

Føroyska veteranlandsliðið skal leygardagin spæla móti Liverpool Legends. Framvegis er ikki greitt, hvørjir skulu manna føroyska liðið, men tað verður úttikið seinni í vikuni. Seinast stóðu Jens Martin Knudsen og Uni Arge á odda fyri úttøkuni, har hópurin millum annað taldi Kaj Leo Johannesen, løgmann, Jens Erik Rasmussen, Allan Mørkøre og Kára Reynheim.

# Mistu fokus eina løtu

**Eingin ivi var um, at føroysku kvinnurnar vóru nógv betri enn tær frá Jersey, men av tí at spælararnir ikki nóg væl megnaðu at halda fokus, gjørdist dysturin óneyðuga spennandi**




Hilmar Jan Hansen

Á pappírinum var Jersey lætt mótstøða hjá Føroyum, og tað var tað eisini partvíst í sjálvum dystinum. Men eftir eitt fyrsta sett, har alt gekk sum fótur í hosu og føroysku kvinnurnar vunnu 25-6, tóktist ringt hjá teimum at savna seg fult um uppgávuna.

Í teimum báðum seinnu settunum gjørdi føroyska liðið ein hóp av feilum, og fyri tað nógva var talan um púra óneyðugar feilir, tí Jersey-kvinnurnar, sum fyri tað mesta vóru komnar rímiliga nógv til árs, megnaðu ongantíð av álvara at trýsta.

Men tað, sum føroysku kvinnurnar góvu frá sær, tóku tær frá Jersey gleðiliga ímóti, og so fekk ikki verið øðrvísi.

Eisini gjørdi seg galdandi, at lætta mótstøðan elvdi til, at venjararnir vildu lata allar royna seg. Tað kostaði eisini eitt sindur, tí hvørja ferð onkur útskifting varð gjørd, fór rútman í eina løtu, so tí var sera lítið flótandi spæl at síggja í øðrum og triðja setti, sum bæði vórðu vunnin 25-16.

Kortini var eingin ivi um, hvønn veg dysturin fór, og serliga ímóti endanum á triðja setti sá spælið sera gott út hjá kvinnunum, ið kanska høvdu gott av at finna útav ímóti veikari mótstøðu, at tú ikki kemur sovandi til nakað í kappingini á Oyggjaleikunum.



**Hjørdis Johannessen smasjar í dystinum ímóti Jersey**
Mynd: Álvur Haraldsen

## Skinklaðu eitt sindur

Angelie Joensen, sum spældi hevari tað mesta av øðrum og alt triðja sett, ásannaði eftir dystin ímóti Jersey, at føroyska spælið læt seg ov nógv ávirka av mótstøðuni.

– Av tí at tær ikki vóru so góðar, gjørdu vit okkum ikki nóg stóran ómak og fóru at sløsa. Men tað var deiligt at spæla og gott at vinna, tí ímóti Jersey kundu vit ikki liva við øðrum enn einum greiðum sigri, segði hon.

Eisini hjálparvenjarin, Jóhan Petur á Stongum, helt, at vánaliga mótstøðan gjørdi sítt til, at liðið hevði ilt við at halda konsentratiónina alla tíðina.

– Men eisini gjørdu nógvu útskiftingarnar, at vit av og á upplivdu fleiri misskiljingar, men tað var allíkavæl skjótt, at innskiftu spælararnir funnu seg til rættis, segði hann.

– Tað hevði nógv at siga at fáa allar í gongd, og eg haldi, at hóast vit í løtum gjørdu tað óneyðuga torført fyri okkum sjálvi, fingu allir spælararnir gjørt ein góðan figur í hesum fyrsta dystinum

*hil*

# Skjótt spæl og sterkar servur

**Fyrsti dysturin hjá flogbóltsmonnunum var ímóti Guernsey, sum ikki gjørdi tær stóru skreytirnar, men tó royndi at spíla seg út í triðja setti**




Hilmar Jan Hansen



**Hans Fróði Jensen leggur her upp til Jón Falkvard í dystinum ímóti Guernsey**
Mynd: Álvur Haraldsen

**FAKTA**

**Menn: Føroyar-Guernsey 3-0 (25-11, 25-10, 25-21)**
**Kvinnur: Føroyar-Jersey 3-0 (25-6, 25-16, 25-16)**

Tað var væntandi, at fyrsti dysturin hjá manslandsliðnum í flogbólti fór at enda við sigri, tí fyrr hava ikki verið trupulleikar av liðnum hjá Guernsey, ið ikki rættiliga røkkur upp til dygdirnar, føroyski flogbóltsurin hevur.

So var eisini í gjár, tá tað serliga í teimum báðum fyrstu settunum var stórur munur á. Fyrst og fremst vóru tað servurnar, ið sótu øgiliga væl, og tey bæði fyrstu settini var nóg illa nøkur duell í opna spælinum.

Tað vísti seg at vera trupult hjá Guernsey at fáa móttøkurnar at rigga, tí føroysku servurnar vóru harðar, presisar og varieraðar. Onkur servuess vóru uppií, men sum oftast fingu teir hjá Guernsey tikið ímóti, men bara ikki spælt bóltin nóg væl víðari.

Eftir at hava lagt seg á odda 2-0, við settúrslitunum 25-11 og 25-10, tóktist føroyska liðið falla í vanligu fellurna, tí teir spældu í triðja setti, sum høvdu teir longu vunnið dystin. Tað gjørdi, at menn ikki vóru nóg neyvir, og heldur ikki eydnaðist at leggja sama servutrýstið á.

Kortini var ongantíð vandi á ferð, og hóast Guernsey slapp at kløkka eitt sindur ta einu løtuna, varð setti tikið og sigurin vunnin. Fult uppiborið, tí føroyska liðið fekk skjóta spælið at koyra væl í fyrstu settunum, og tá triðja settið skuldi takast, eydnaðist eisini at fáa ferðina uppaftur.

Hóast mótstøðan í løtum kendist í so lítil, mundi tað koma væl við hjá føroysku flogbóltsmonnunum, at teir í friði og náðum kundu fáa roynt sítt egna spæl, og tað eydnaðist so mikið væl, at teir helst eru betur fyrireikaðir, tá mótstøðan fer at gerast sterkari í komandi dystum.

## Spældu okkara spæl

Landsliðsvenjarin hjá monnunum, Fridolin Bic, var væl nøgdur við innsatsin ímóti Guernsey, hóast hann hevði ynskt sær harðari mótstøðu.

– Eg kundi hugsað mær, at mótstøðuliðið kundi verið eitt sindur betri, men ein sigur er ein sigur, og tað fegnist eg sjálvandi um. Vit spældu okkara spæl allan dystin. Og vit spældu stórt sæð alla tíðina, júst sum tað skal gerast ímóti einum verri liði, segði hann.

– At teir í triðja setti lesa servuna hjá okkum, er sum so ofta, at mótstøðuliðið venur seg við servurnar hjá hinum. Tað, sum var gott í dag, var at vit ongantíð lagaðu okkum eftir teimum, men royndu at spæla so væl, sum vit kundu.

Ein av spælarunum á føroyska liðnum, Bjarki Enni, spældi í gjár sín fyrsta a-landsdyst, og hann var nøgdur við avrikið og úrslitið:

– Vit servaðu ótrúliga væl fyrstu tvey settini og teir høvdu ikki so góðar móttøkur. Í triðja setti skiftu vit nógv út, og servurnar vóru kanska heldur ikki so góðar, segði Bjarki, sum hevur vant alla tíðina, síðani liðið var úttikið. Tí var hann eisini klárur, tá brúk var fyri einum manni í evstu løtu, tí Rúni Weihe noyddist at geva avboð.

*hil*